LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office

Løgtingið

**Svar**
**uppá**

**skrivligan fyrispurning nr. 101/2019 eftir tingskipanini § 52a til Bárð á Steig Nielsen, løgmann, frá Kristinu Háfoss, løgtingsmanni, um upplating av landamørkum uttan COVID-19 kanningar**

**Fyrispurningurin var soljóðandi:**

1. Hví verða landamørkini latin upp 15. juni uttan at COVID-19 kanna øll, ið koma til Føroya?
2. Er ætlanin ikki at seta lógarkrav um, at øll, sum koma til Føroya, skulu COVID-19 kannast?
3. Um valt verður at kanna øll, ið koma til Føroya, hvussu skjótt kann hetta vera klárt – og hvussu nógv skulu ferðafólk vænta at rinda fyri tílíka kanning?
4. Hví verður latið upp fyri somu londum sum Danmark – heldur enn at landsstýrið sjálvt tekur støðu til, hvørjum londum latið verður upp fyri?
5. Í juni mánaði lata flest øll ES-lond mørkini upp hvør fyri øðrum – ætlar løgmaður, at allir borgarar í ES tá eisini kunnu koma til Føroya?
6. Hvat hevur løgmaður gjørt fyri at tryggja, at føroyskir myndugleikar sjálvir taka avgerð um, hvørjum londum Føroyar lata upp fyri?

**Svar:**

**Til 1:**
Tá ið korona farsóttin byrjaði, vóru nógvir ósvaraðir spurningar, tí hetta var eitt nýtt og á mangan hátt ókent fyribrigdi. Fyri at halda smittuvandanum niðri og fáa tamarhald á sjúkuútbreiðsluni skerdu Føroyar eins og onnur lond virksemið heilt munandi, og landamørk vórðu stongd fyri ferðandi.

Munandi skerjing og stongsil eru tó ikki haldgott í longdini.

Sum frá er liðið, er betri tamarhald fingið á smittuni – ikki bara hjá okkum, men eisini í londunum kring okkum. Váðin fyri at fáa smittuna aftur til Føroya og at breiða seg er tí eisini minkaður. Harumframt má havast í huga, at skerda virksemið hevur munandi kostnað fyri samfelagið, tí ein skerdur búskapur rakar meint á fleiri mótum – eisini tí heilsuliga. Avbjóðingin er so at finna eina skilagóða javnvág millum avleiðingarnar av smittuni og avleiðingarnar av skerda virkseminum.

Tá ið avgerð var tikin um at lata upp, tí smittustøðan í londunum kring okkum varð mett at loyva tí, var næsti spurningurin, hvussu vit ansa eftir okkara veikaru og viðbreknu medborgarum.

Fyri framhaldandi at halda smittuni niðri, vóru ymsir vegir at ganga.

Skuldu øll, sum koma til landið, kannast, er tað rættiliga umfatandi. Tað er trupult at meta um, hvussu nógv ferðafólk fara at koma í summar, men tøl sum 5-6.000 um vikuna, tá ferð er aftur komin á, vórðu nevnd. Hesi komu so aftrat kanningunum, sum longu verða gjørdar, og

Tinganes · FO-100 Tórshavn · Faroe Islands
Tel. +298 306000 · Fax +298 306015 · info@tinganes.fo · www.tinganes.fo

kanningarorka má eisini vera tøk til møguligan vøkstur í kanningum av fólki, sum býr í Føroyum. Hetta krevur tí økta kanningarorku.

Avbjóðingin at kanna øll, sum koma til landið, hevði verið til at loyst, men hon hevði verið stór: virksemið skal skipast bygnaðarliga, tí sambært Heilsumálaráðnum hevði sjúkrahúsverkið ikki kunnað tikið sær av hesum, uttan at tað gongur útyvir verandi virksemi; nógv fólk skulu finnast at gera potingarnar; tilfar til potingar og royndarstovukanningar skal útvegast í kapping við onnur.

Tá londini, ið latið varð upp fyri tann 15. juni, tyktist at hava tamarhald á smittustøðuni, varð valt ikki at kanna øll, ið komu til landið, men ein part. Ansast skuldi so enn betri eftir teimum veikaru í samfelagnum, við at serlig atlit skuldu takast, so smittan ikki kemur inn á sjúkrahús, ellis- og røktarheim ella á bústovnar.

Síðani spurningurin varð settur verður latið upp fyri nógv fleiri londum frá 27. juni. Harafturat hevur landsstýrið fingið vitan um, at privat virki kunnu klára at kanna og poda 5-6.000 fólk um vikuna fyri ein sámiligan prís, um tey fingu nakað av tíð til fyrireiking. Við hesum hevur landsstýrið nú avgjørt, at øll ferðandi, sum koma til landið, skulu kannast. Í fyrstu atløgu fyri landsins rokning. Verjugarðurin um Føroyar verður sostatt styrktur í eina tíð, meðan vit síggja, hvussu støðan fer at verða.

Sum so ofta sagt í COVID-19 tíðini - støðan og metingarnar broytast alla tíðina. Og vit mugu tí støðugt fylgja gongdini og verða klár at tillaga skipanirnar, um neyðugt – í eini hóskandi javnvág millum heilsufakligt og búskaparlig atlit, sum raka meint – eisini heilsuliga.

**Til 2:**
Sum nevnt omanfyri, hevur Farsóttarnevndin, eftir ynski frá landsstýrinum, nú ætlan um at krevja, at øll, sum koma til Føroyar, lata seg COVID-19 kanna. Henda avgerð er m.a. tikin í kjalarvorrinum av, at Føroyar hin 27. juni verða latnar upp fyri nógv fleiri londum.

**Til 3:**
Landsstýrið hevur fingið at vita, at møguleikin at kanna øll, sum koma til Føroyar fyri COVID-19, kann vera klárur 27. juni. Landsstýrið ætlar at bera kostnaðin av hesum fyrstu 14 dagarnar. Í løtuni verður mett um, hvussu kostnaðurin kann latast yvir til tann ferðandi at gjalda. Kostnaðurin fyri hvørja kanning við poding verður 390,- kr.

**Til 4-6:**
Atgongdin til Føroya er reglubundin í tveimum ymsum lógum út frá ymsum fortreytum.

**Til 4-6:**
Atgongdin til Føroya er reglubundin í tveimum ymsum lógum út frá ymsum fortreytum.

**Smittandi sjúka:**

Viðurskiftini viðvíkjandi tí at bera upp fyri vandanum at smitttandi sjúku, sum kemur til landið, er ásett í lógini um smittandi sjúku.

Eftir ræðislógini § 1, stk. 2, nr. 7 eru viðurskiftini viðvíkjandi smittandi sjúkum á donskum hondum.

Lógin um smittandi sjúkur tekur ikki dagar í millum, hvørt talan er um útlending ella ríkisborgara, men leggur dent á vandan fyri, at smittandi sjúka breiðir seg. Formligu heimildirnar í hesi lóg hevur farsóttarnevndin og danskir myndugleikar. Tað ber væl til at gera broytingar í hesi lóg fyri Føroyar,

so at føroyskir myndugleikar fáa størri heimildir. Uppskot um at broyta nevndu lóg er gjørt, og landsstýrið kann tí leggja uppskotið fyri tingið nær sum helst, um politiskur vilji er til tað.

**Marknaeftirlit:**

Viðurskiftini viðvíkjandi uppihald hjá útlendingum í landinum og marknaeftirlit eru ásett í útlendingalógini. Lógin tekur bert atlit til um viðkomandi sum kemur til landið er borgari í ríkinum ella ikki.

Eftir ræðislógini § 1, stk. 2, nr. 22 er marknaeftirlit á donskum hondum. Av tí at marknaeftirlit ikki er Føroyar og Danmarkar ímillum, hevur danska stjórnin aftrað seg við at hava ymiskar reglur fyri atgongd hjá útlendingum í Danmark og í Føroyum.

Í Tinganesi, 24. juni 2020

Bárður á Steig Nielsen
løgmaður